# Eyðun Hestakorn

1.
Viljið tit nú lýða á,
væl ljóðar mín tunga,
gjørd um Eyðun hestakorn
og Hákun kongin unga.

*Trínið lættliga dansin!*
*Dagurin skín so fagurliga,*
*komin er hægst á summarið.*

2.
Viljið tit nú lýða á,
meðan eg flyti fram
um hann Eyðun hestakorn,
tann trælborin mann.

3.
Um hann Eyðun hestakorn,
tann trælborin mann,
hann var seg í Norðnesi,
tá Eiriks dóttir brann.

4.
Kongurin situr í hásæti,
skoðar gull í skrín:
“Rennur mær nú aftur [í] grun
bróðurdóttir mín.”

5.
Kongurin situr í hásæti,
skoðar gull í borg:
“Liggur ei leingi á kistubotni,
vunnið er við sorg.”

6.
Tað er reystur Hákun kongur,
heitir á sveinar tvá:
“Bið hann Eyðun hestakorn
í salin for meg inngá!

7.
Eyðun gekk í hallina inn,
frá man frættast víða,
kongurin situr í hásæti,
letur ivri síga.

8.
Eyðun gekk í hallina inn,
hugsar um ongan váða:
“Hoyr tað, kongurin, harra mín,
hvat havið tær at ráða?

9.
“Nú skal ráða um fornar sakir,
duldar eru leingi,
tú hevur svikið tað væna vív,
so mangar reystar dreingir.”

10.
Hákun ríður á tingið inn,
Eyðun honum á baki:
“Hoyr tú, kongur, harra mín,
hvat eru tygara sakir?”

11.
“Katrin liggur í døkkari mold,
Margreta brann á báli,
tað eru sjóndarmerki til,
at vitnað hava tit galið.

12.
Hon er seld í ókunn lond,
alt fór eftir vari,
hoyr tú, Eyðun hestakorn,
við svikum hevur tú farið!

13.
Tú hevur svikið tað væna vív,
so mangan reystan kappa,
alt tað gull og leysafæ
hevur tú undir teg snappað.”

14.
Tað var reystur Hákun kongur,
svarar so for seg:
Tunsborg og Hósló
legði tú undir teg.

15.
Tunsborg og Hósló
tað vóru oyggjar tvinnar,
Berina hevði tú ætlað tær,
tað var ikki minna,

16.
Beltið breitt og búgvið væl,
Eirikur kongur átti,
hoyr tað, Eyðun hestakorn,
vit eru ikki um sáttir!

17.
Beltið breitt og búgvið væl,
sett við dýrar ringar,
tað kom ikki á bróður míns bak,
uttan hann reið til tinga.

18.
Beltið breitt og búgvið væl,
sett við dýran krans,
tað kom ikki á bróður míns bak,
uttan hann reið í dans.

19.
Beltið breitt og búgvið væl,
sett við rósur og liljur,
tað kom ikki á bróður míns bak,
uttan hann reið at gilja.

20.
Beltið breitt og búgvið væl,
sett við dýrar steinar,
tað kom ikki á bróður míns bak
uttan jóladagin eina.

21.
Beltið breitt og búgvið væl,
sett við ringar fleiri,
tú hevur gjørt fyri lívi tínum,
um enn tað væri meiri."

22.
"Tað tykir mær einki vera,
at tú letur meg pína,
tó læt tú á báli brenna
bróðurdóttur tína."

23.
"Tað eg læt á báli brenna
bróðurdóttur mína,
voldi tú, Eyðun hestakorn
og svikarkonur tínar."

24.
Tóku teir Eyðun hestakorn,
bundu hann so fast,
ei var smáur líntvongur,
honum á beinum brast.

25.
Tóku teir Eyðun hestakorn,
hongdu upp í træ,
tað er mær av sonnum sagt,
at ravnar rivu hans ræ.

26.
Tað gjørdi reystur Hákun kongur
við so mikið mein,
hongdi Eyðun Hestakorn
í hægstu gálgargrein.

27.
Tangaðu kjøt av beinum út,
kasta for úlvar niður.
"Hoyr tú, Eyðun hestakorn,
her skuldi tú hingið fyrr!"

28.
Tað er frúgvin Gýða,
eftir stræti gongur,
hennara maður í Norðnesi
í reyðum skildri hongur.

29.
Tað er frúgvin Gýða,
eftir stræti gekk,
hennara maður í Norðnesi
í reyðum skildri hekk.